


# Vælferðarpolitisk mál fyri tingið: 2



Val

HANS PAULI STRØM
landsstýrismaður

**Lægsta fyritíðarpensjon fær stórliga hækking og fyri allar fyritíðarpensjonistar fer mótrokningin av aðrari inntøku niður í helvt**

Allir flokkar á tingi tóku nú um dagarnar væl undir við uppskotinum hjá landsstýrinum um stórar hækkingar í inntøkumøguleikunum hjá fyritíðarpensjonistum.

**Ongin fjølmiðil helt tað vera vert at nevna...**
Av órannsakiligum grundum hevur ongin fjølmiðil, hvørki almennur ella privatur, hildið hetta verið vert at tikið uppá tungu...

**...men tað er hetta tað snýr seg um:**
Eg loyvi mær at greiða Føroya fólki frá í stuttum, hvat hetta snýr seg um:

1. jan. 2008 fáa lægstu fyritíðarpensjonistar eina eyka viðbót uppá 15.360 kr. árliga, svarandi til eina hækking uppá 1280 kr. um mánaðin.

1. jan. 2009 fáa lægstu fyritíðarpensjonistar aftur eina hækking í hesi viðbót, so hon kemur uppá 31.944 kr. árliga, svarandi til eina hækking uppá 2662 kr. um mánaðin.

1. jan. 2008 verður mótrokningin í pensjónini av aðrari inntøku minkað úr 60% niður í 30%. Tvs. at pensjónin ikki skal vera skorin við 60 oyru men bert við 30 oyru av hvørjari krónu sum inntøkan fer upp um inntøkumarkið uppá 81.300 kr.

1. jan. 2009 skal reglan broytast, soleiðis at tey sum fáa fyritíðarpensjón tilkenda eftir at tey eru blivin 60 ár, skulu fáa fulla upphædd útgoldna, og ikki sum í dag, har tey bert fáa upphæddina útgoldna sum svarar til eitt stig lægri, enn tað tey hava fingið tilkent.

**Lægsta fyritíðarpensjón lyftast upp til miðal**
Hetta eru rættiliga stórar og víðgangandi broytingar. Fyri lægstu fyritíðarpensjonistar er hetta ein ásannan av, at teirra pensjón í dag er ósømiliga lág og røkkur ikki til at kunna lívbjarga sær. Tí verður í tveimum stigum - nú og um eitt ár - sett inn ein eyka viðbót, sum er so stór, at munurin millum lægstu og miðal fyritíðarpensjón verður tikin burtur. Við hesi broyting verður støðan í veruleikanum tann, at um eitt ár hava vit bert tvey stig í fyritíðarpensjón, nevnliga miðal og hægstu.

FYRITÍÐARPENSJÓN

| | Lægst | Miðal | Hægst | Lægst | Miðal | Hægst | Lægst | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Stakur | 6882 | 9439 | 12980 | 8437 | 9817 | 13499 | 10055 | 10209 |
| Giftur | 5483 | 8133 | 11556 | 6982 | 8458 | 12018 | 8542 | 8797 |







**Minni mótrokning av aðrari inntøku**
Í dag er støðan tann, at hevur ein fyritíðarpensjonistur aðra inntøka t.d. av onkrum lønandi arbeiði, so verður hann revsaður ógviliga hart, tá henda inntøkan fer upp um markið uppá 81.300 kr. Tá verður pensjónin skorin við 60 oyru fyri hvørja krónu, sum inntøkan fer upp um hesar 81.300 kr.

Nú verður hetta broytt, so tað skal løna seg betur hjá fyritíðarpensjonistum at brúka sín arbeiðsførleika til at hava eitt arbeiði aftrat pensjónini. Mótrokningin skal nú minkast úr 60% niður í 30% av hvørjari krónu uppum inntøkumarkið. Hetta verður gjørt fyri at eggja fyritíðarpensjonistum til at hava eitt arbeiði aftrat pensjónini, bæði fyri at teir skulu kunna hava eina betri inntøku, og at teir skulu eggjast til at vera virknir á arbeiðsmarknaðinum, og harvið eisini stimbrast sosialt og heilsuliga.

Fyri at vísa, hvat hetta merkir, kunnu vit taka ein miðal fyritíðarpensjonist. Í dag er øll viðbótin burtur, tá onnur inntøka er komin uppá 115 túsund kr. Við broytingini kann sami pensjonistur tjena 35 túsund aftrat, áðrenn viðbótin er burtur.

Diskrimineringin av 60 ára gomlum skal burtur
Av onkrari grund varð ásett í 1999, at um ein man fekk tilkent eina fyritíðarpensjón, aftaná at man varð blivin 60 ár, so fekk man bert útgoldið ta upphæddina, sum svaraði til eitt stig lægri. Altso, fekk t. d. ein 60-ára gamal tilkent hægstu pensjón, so fekk hann bert útgoldið miðal. Fekk hann tilkent miðal, so fekk hann bert tilkent lægstu.

Hetta skal nú broytast frá 1. jan. 2009, soleiðis at eisini ein, sum fær tilkent fyritíðarpensjón eftir at hann er blivin 60 ár, fær útgoldið tað fullu upphæddina sum hann hevur rætt til.

**Kostnaðurin er settur av á fíggjarlógini**
Kostnaðurin av hesum broytingunum verður í 2008 mettur til 11 mió. kr. Fyri 2009 verður kostnaðurin mettur til 21 mió. kr. Av tí at hetta eisini gevur nakrar eyka skattainntøkur við sær, so verður nettokostnaðurin fyri landskassan mettur til einar 9 mió. í 2008 og 16 mió. í 2009. Peningurin er settur av til endamálið í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2008.

# Jóhan Páll Joensen, flytir fokus



Val

HEIDI PETERSEN
Tjóðveldi

Tá formaðurin í Føroya Arbeiðsgevarafelag, Jóhan Páll Joensen, fer út ímóti eini roynd at bøta um barsilsskipanina í Føroyum, og setir tað, at man roynir at gera umstøðurnar hjá børnunum og familjum í Føroyum betri, uppímóti trupulleikanum við manglandi arbeiðsmegi í Føroyum, hevur hann flutt fokus.

Størsti trupulleikin øll vinnuvirki í Føroyum hava sitið við seinastu tvey árini, er mangul uppá arbeiðsmegi. Manglandi arbeiðsmegin hevur verið við til at skrúva prísirnar upp í eitt nú Føroysku byggivinnuni, so øll bygging er vorðin munandi dýrari seinastu árini, 20 – 30 %, ja, í onkrum førum kanska 50% dýrari at byggja nú, enn fyri tveimum árum síðani.

At ongin loysn er komin uppá spurningin um arbeiðsmegi í Føroyum, at landsstýrið situr sum ryssa yvir deyðum fyli og bínir, uttan at tora, vilja ella megna at taka avgerð, hevur longu kosta Føroyska samfelagnum milliónir av krónum, men tað sum verri er, so er at hetta eisini størsta forðingin fyri búskaparligum vøkstir í dag.

Tá nú politikararnir royna at yvirbjóða hvønn annan um at bøta um barsilsskipanina, kennist tað eitt sindur hykleriskt, tí teir hava júst felt uppskotið frá Tjóðveldinum um at leingja barsilsfarloyvi í tinginum.

So, Jóhan Páll Joensen, halt eg til málið um manglandi arbeiðsmegi og ger nakað við tað, tað verður ongantíð barsilskipanin sum kemur at bera ábyrgdina fyri tí trupulleikanum við manglandi arbeiðsmegi, tað er sitandi samgonga.

# Hvat ræðir prestafelagið?

JOHN S. MYLLHAMAR



Hví er tað so umráðandi, at ein prestur ikki skal hava royndartíð? Hví skal ein prestur, eftir at hann er settur í starv, verða leysur av tí kirkjuráði, sum hevur valt hann? Hvat er tað hann ræðist?

Grundgevingin hjá formanninum, at hann um trupuleikar stíga upp, er settur eftir skeivum fortreytum, heldur als ikki. Tað vita prestarnir eisini. Líkamikið um hann hevur havt royndarprædiku ella hevur verið til eksamiu hjá bispi, so kann hann gerast ein heilt annar persónur eftir hetta. Tað hava vit tíverri fleiri dømi um. Havi áður víst á hetta við áramálsetan, og hevði tað verið ein frálík skipan. Tí eigur at vera hildið fast við, at prestar eins og aðrir embætismenn, hava eina royndartíð, eini 3-5 ár.

Einki er at óttast, tá ið prestur ger gerning sín og røkir sítt starv.

Lesið Sosialin -so eru tit við!